SANKTA JÓSEFS BARNAGARÐUR

Varðagøta 12 • FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 28 54 • Fax 31 69 90

## Námsfrøðingar

Ert tú áhugað/ur at verða partur av einum vælsjóðaðum, jaligum starvsfólkabólki?

*-So er tað tær vit hava tørv á.*

Okkum tørvar tveir námsfrøðingar 30-32 tímar um vikuna, frá **1. januar 2008**. Ella eftir avtalu.

Eisini hava vit tørv á einum námsfrøðingi til avloysarastarv, fyri námsfrøðing í farloyvi. Starvið er 32 tímar um vikuna frá **1. januar 2008, og fyribils í eitt ár**.
Sankta Jósefs barnagarður er ein sjálvsognarstovnur, ið hevur virkað í 76 ár. Í stovninum eru 17 starvsfólk. Av hesum seytjan, hava 8 námsfrøðiliga útbúgving. Barnatalið er 82, í aldrinum 3-7 ár.

**Vit vænta, at tú:**

- Ert fyrikomandi.
- Er íðin, nærlagdur og álítandi.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevnir.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum.
- Er jalig/ur, og vísir gleði og áhuga í arbeiðinum.
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.
- Hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin.

Størvini eru lønt sambært Føroya Pedagogfelag og KAF í lønarstiga 11-17.

***Ljóðar hetta áhugavert?***

So send okkum eina skrivliga umsókn, saman við prógvi og viðmælum innan 30. november til

Sankta Jósefs Barnagarð
Varðagota 12
100 Tórshavn

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Louise Smets, leiðara tlf. 312854

Sosialurin
www.sosialurin.fo

VESTMANNA SKÚLI

**Vestmanna Skúli**
Toftavegur 12 · FO - 350 Vestmanna · Føroyar
Tlf. 470100 · Fax: 470101 · vestmanna@skulin.fo

# LÆRARASTARV í Vestmanna Skúla

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv, 3. januar – 30. juni 2008, fyri lærara í barnsburðarfarloyvi. Tímatalið um vikuna er 23

- Heimkunnleika í 6. og 7. fl.
- Føroyskt, heimstaðarlæru og rokning í 2. fl.
- Føroyskt og søgu í 7. fl.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsningar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 230100, ella frá varaleiðaranum Erling Munck Pedersen, tlf 470102 ella 230101

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 30. nov. 2007.

---

**Í Vestmanna skúla** eru 204 næmingar og 21 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/ves/ Vestmanna Skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur og grønur skúli. Skúlin arbeiðir annars í løtuni við hesum evnum: at menna trivnaðin, byrjanarundirvísingina, samstarvið við vinnulívið og at geva næmingunum fjølbroyttar avbjóðingar.

# Goymslu- og handilslærlingur

Søkt verður eftir goymslu- og handilslærlingi til P/F Vónina í Fuglafirði at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðið umfatar m.a.:**
- beinleiðis sølu frá goymsluni
- dagliga avgreiðslu av telefonbíleggingum
- goymslustýring (Navision Attain)

**Vit ynskja at tú hevur HH ella FHS og vænta at tú:**
- ert framfýsin og ágrýtin
- hevur lætt við at samskifta
- ert áhugað/ur í fiskivinnuni
- hevur teldukunnleika

Lønin er sambært galdandi sáttmála.

Umsókn, saman við møguligum prógvum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. november.

*P/F VÓNIN*
BAKKAVEGUR 22 · POSTBOKS 19
FO-530 FUGLAFJØRÐUR · TLF. 474200

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**

# Upptøka av lesandi til SJÚKRARØKTARFRØÐING

Nýggjur flokkur byrjar 4. februar 2008. Umsóknarfreistin er longd til 15. november 2007

**Útbúgving og møguleikar**
Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing er spennandi og avbjóðandi og tekur 4 ár. Hon gevur heitið bachelor í sjúkrarøktarfrøði - Bachelor of Science (BSc) in Nursing. Útbúgvingin gevur tær fjølbroyttar starvs- og menningarmøguleikar innan heilsuverkið bæði her á landi og uttanlands.

Sum útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur hevur tú nomið tær holla vitan og førleika at útinna sjúkrarøkt, soleiðis at tú upplivir, at tú veruliga kanst gera mun.

**Hølis- og lestrarumstøður**
Hølisumstøður og umstøður skúlans yvirhøvur eru avbera góðar. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin og seinni søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum fluttu fyrr í hesum árinum í nýggj nútímansgjørd høli miðskeiðis í býnum. Alt tilfar og øll útgerð lúka tíðarinnar krøv.

Saman við 120 øðrum lesandi, væl útbúnum lærarum og starvsfólki verður tú partur av einum virknum og vinarligum lestrarumhvørvi, har trivnaðurin er í hásæti.

**Lestrarvegleiðing**

Lestrarvegleiðari skúlans veitir vegleiðing og góð ráð. Teldupostbústaðurin er: anne.lise.winther@skulin.fo, tlf. 325 265.

**Umsókn**

Teldutøkt umsóknarskjal kann takast niður av heimasíðu skúlans, www.srfs.fo, ella tú ringir 352 250 og biður um at fáa tað sent í postinum. Á heimasíðuni kanst tú eisini lesa um upptøkutreytir o.a.

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. november 2007 og verða sendar til

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**
Jónas Broncks gøta 25
FO-100 Tórshavn
merk brævbjálvan: Umsókn lesandi

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

